tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 17-2018 |
| Fundardagur | 29. december 2018 kl. 12:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest. Kristin Michelsen er í feriu, tískil leiður Anita Vibergsdóttir, virkandi borgarstjóri, fundin.
Skrivari: Jónleyg J. Bech

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Eykajáttan heystið 2018 | 3 |
| 2 | Ásetan av fundardøgum 2019 | 3 |
| 3 | Uppskot til samstarvsavtalu um Sernám í Suðuroynni | 4 |
| 4 | Eldraøkið í Suðuroynni | 5 |
| 5 | Útnorðurskúli í Hvalba | 5 |
| 6 | Val av eftirskúlanevnd | 6 |
| 7 | Loyvi borgarstjórans at virka sum borgarstjóri og løgtingslimur | 7 |
| 8 | Kunning frá borgarstjóranum um feriu | 8 |


Anita Vibergsdóttir lesur skránna fyri fundin upp og spyr, um nakrar viðmerkingar eru. Kristina Roest ynskir viðmerkt, at tað undrar hana, at í samband við, at sk´rain til fundin varð send út, fingu býráðslimir eitt sms við boðum um at koma við møguligum viðmerkingum til skránna innanfyri hálvan tíma, hóast hetta var 9 dagar áðrenn fundurin skuldi vera. Serliga tí, at onkur úr umsitingini síðan hevur fingið mál á skránna aftaná. Anita Vibergsdóttir greiðir frá, at hetta kom av tí, at tað var beint upp undir jólaferiu og skrivstovan stongdi sama dag. Hon metti tað vera fragari at fáa stutta freist heldur enn onga. Kristina greiðir frá, at hon var stødd til handils og fekk ikki tíð at umrøða seg og støðuna við hini í meirlutanum. Tískil sendi hon sjálv viðmerking um eitt mál til skránna. Hon



A. Vibergsdóttir
Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 17-2018 |
| Fundardagur | 29. december 2018 kl. 12:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

viðmerkir, at tað bleiv sagt, at hetta var eitt mál frá henni, men hetta hevur verið eitt ynski frá meirlutanum longi.Anita Vibergsdóttir viðmerkir, at allur meirlutin sendi ein teldupost við tveimum øðrum málum. Aftaná kom teldupostur frá Kristinu Roest einsamallari við tí síðsta málinum. Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at tað er gott, at býráðslimir fáa skránna til viðmerkingar. Hetta er fyrstu ferð, tað er komið fyri og hon vónar, at hetta verður siðvenja framyvir.



A. Vibergsdóttir
Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 17-2018 |
| Fundardagur | 29. december 2018 kl. 12:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

00.30.18-Ø00-3-18

## 1. Eykajáttan heystið 2018

### Málsfrágreiðing

**Býráðið, 3. december 2018, pkt. 2:**
1. viðgerð av eykajáttan á heysti 2018 áljóðandi 3.720.200 kr., ið verður fíggjað av likviditetinum:

Eykajáttan einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

### Avgerð

2. viðgerð av eykajáttan á heysti 2018 áljóðandi 3.720.200 kr., ið verður fíggjað av likviditetinum:
Eykajáttan einmælt samtykt við 2. viðgerð.

### Skjøl

- Eykajáttan 2018.pdf

**00.22.04-A00-2-18**

## 2. Ásetan av fundardøgum 2019

### Avgerð

Anita Vibersgdóttir skýtur upp at hava býráðsfundir 2. mánadag í hvørjum mánaða. Nendir hava vikuna frammanundan.

Súsanna Bertholdsen skýtur upp at hava býráðsfundir 2. ónsdag í mánaðinum kl. 19.00.

Samtykt við 5 atkvøðum fyri at hava býráðsfundir hvønn 2. ónsdag í mánaðinum kl. 19.00 og at nevndirnar hava fundir vikuna frammanundan. Anita Vibergsdóttir, Bjarni Hammer, bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu fyri, Alvi Mortensen atkvøddi ikki.

**27.00.00-I00-2-18**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 17-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 29. december 2018 kl. 12:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## 3. Uppskot til samstarvsavtalu um Sernám í Suðuroynni

### Málsfrágreiðing

**Sosiala nevnd, 2. oktober 2018, pkt. 3:**
Nevndin mælir til at broyta innihaldið í innganginum til soljóðandi:

Kommunurnar í Suðuroynni hava gjørt av at samstarva um skrivstovuhaldið hjá SERNÁMS-deildini í Suðuroynni, sum verður staðsett í Vági. Hendan avtalan staðfestir hetta samstarv.

Einmælt samtykt at mæla býráðnum til at undirskriva avtaluna um skrivstovuhaldið hjá Sernámsdeildini í Suðuroy við omanfyri nevndu broyting.

**Fíggjarnevndin, 1. november 2018, pkt. 4:**
Umsitingin setur seg í samband við Sernám fyri at fáa nærri lýst, hvørjar arbeiðsuppgávur liggja hjá einum møguligum skrivara.

**Býráðið, 3. december 2018, pkt. 13:**
Bíðað verður eftir svari uppá fyrispurning sendur Sernám.

### Avgerð

Anita Vibergsdóttir viðmerkir, at hon heldur at vald og gjald eigur at fylgjast at í samband við setan av skrivara, so at kommunurnar verða betri umboðaðar í setanarbólkinum. Hon kundi hugsað sær, at kommunrnar velja 2 umboð í bólkin, evt. fakumboð.

Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum til samstarvsavtalu um Sernám í Suðuroynni. Í samband við setan av skrivara til Sernám í Suðuroynni ynskir býráðið, at kommunurnar í Suðuroynni velja tvey umboð í setanarbólkin, evt. fakumboð.

### Skjøl

- Uppskot til samstarvsavtalu sent býráðslimunum
- 2018-08 Samstarvsavtala um Sernám í Suðuroy.docx
- Samrøða við Margreth Olsen, leiðari Sernám 03.12.2018 kl. 14.25

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 17-2018 |
| Fundardagur | 29. december 2018 kl. 12:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.17.15-A00-7-15**

## 4. Eldraøkið í Suðuroynni

### Málsfrágreiðing

Avgerð
Anita Vibergsdóttir biður um at málið verður viðgjørt sum afturlatið mál.

Einmælt samtykt, at málið verður viðgjørt sum afturlatið mál. Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon takkar fyri, at atkvøtt verður um at viðgera mál sum afturlatið. Hetta hevur ikki verið siðvenja áður.

### Skjøl

- FÆ-BHS 2019.pdf
- Kopi af Fíggjarætlanin 2019 og útreiðslur hjá einstøku kommununi.xlsx
- Teldupostur til Landsstýrið frá stýrisformanninum um eldraøkið í Suðuroynni

**17.11.00-I00-1-18**

## 5. Útnorðurskúli í Hvalba

### Avgerð

Anita Vibergsdóttir heitir á býráðið um at beina málið í mentanarnevndina til viðgerðar.

Einmælt samtykt at beina málið til mentanarnevndina til viðgerðar á fyrstkomandi fundi.

### Skjøl

- Skriv frá Hvalbiar Kommunu

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 17-2018 |
| Fundardagur | 29. december 2018 kl. 12:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**17.11.00-P00-1-15**

## 6. Val av eftirskúlanevnd

### Avgerð

Alvi Mortensen viðmerkir, at hann heldur tað vera harmuligt, at hetta málið skuldi kosta 2 mió. Peningurin var settur av til íløgu í verkætlanina á løgtingsfíggjarlógini, men hesin peningurin er ikki brúktur. Bjarni Hammer viðmerkir, at øll løguætlanin er rykt tvey ár fram. Ístaðin er 1 mió. ásett til rakstur til eftirskúlan í 2019.

Uppskott frá Bjarna Hammer, Boga Johannesen, Súsonnu Bertholdsen og Kristinu Roest til 5 mannaða nevnd fyri eftirskúlan í Suðuroynni:

Bjarni Hammer
Mariann Mikkjalsdóttir
tvey umboð úr MMR, ið MMR sjálvt velur
Jens Arni Hammerfoss Leo

Uppskot frá Anitu Vibergsdóttir og Alva Mortensen til 5 mannaða nevnd fyri eftirskúlan í Suðuroynni:

Kristin Michelsen
Bjarni Hammer
Olaus Jespersen
Eitt umboð frá MMR, ið MMR sjálvt velur
Mariann Mikkjalsdóttir

Atkvøðugreiðsla um uppskotið hjá Alva Mortensen og Anitu Vibergsdóttir:
Tvær atkvøður fyri, 4 atkvøður ímóti. Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu ímóti, uppskotið fallið.

Atkvøðugreiðsla um uppskotið frá Bjarna Hammer, Boga Johannesen, Súsonun Bertholdsen og Kristinu Roest:
Fýra atkvøður fyri, tvær atkvøður ímóti, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu fyri, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ímóti. Uppskotið samtykt.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 17-2018 |
| Fundardagur | 29. december 2018 kl. 12:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.10-G00-1-17**

## 7. Loyvi borgarstjórans at virka sum borgarstjóri og løgtingslimur

### Avgerð

Kristina Roest viðmerkir, at hon ynskir at vita, hvat endamálið var við at biðja ein sakførara kanna gegnið hjá Kommunala Eftirlitinum og um tað er Tvøryorar Kommuna ella borgarstjórin sjálvur, ið kærir Kommunala Eftirlitið.

Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen ynska viðmerkt, at býráðið hevur 13. februar 217 játtað borgarstjóranum at vera borgarstjóri og løgtingslimur, og tann játtanin, eins og undanfarnar játtir um sama frá 2012 og 2016 ,var fyri alt valskeiðið. Tí meta tey ikki, at tað er rætt uttan víðari at afturkalla hesa játtan nú. Hartil meta tey hetta ikki vera rætt, tá tað er ivasamt sambært kommunustýrislóggávuni, um slík játtan til borgarstjóran uttan víðari kann verða broytt ella tikin aftur. Tey halda samanumtikið ikki, at nøkur orsøk eru fyri, stutt áðrenn løgtingsvalskeiðið endar, at afturkalla loyvið til borgarstjóran at sita sum tinglimur, meðan hann er borgarstjóri. Hartil er borgarstjórin ikki hoyrdur í málinum av býráðnum, áðrenn avgerð er tikin. Tað er ikki rætt fyrsitingarliga. Slík afturkalling ikki at verða uttan við hóskandi uppsagnarfreist, minsta lagi 6 mánaðir, meta tey, men atlit er ikki tikið til hetta heldur.

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum er ein samtykt galdandi til ein nýggj samtykt er tikin í einum máli.

Súsanna Bertholdsen mælir til, at tilsøgnin ið var givin borgarstjóranum hin 13.02.2017 um at røkja bæði borgarstjórasessin og løgtingssessin, verður tikin aftur.

Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen mæla til, at loyvið at virka sum borgarstjóri og løgtingslimur givið borgarstjóranum hin 13.02.2017 stendur við.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Anitu Vibergsdóttir og Alva Mortensen: Tvær atkvøður fyri, fýra atkvøður ímóti. Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannessen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu ímóti, tilmælið fallið.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Súsonnu Bertholdsen: Fýra atkvøður fyri, tvær atkvøður ímóti. Bjarni Hammer, Bogi Johannessen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu fyri, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ímóti. Tilmælið samtykt við fýra atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 17-2018 |
| Fundardagur | 29. december 2018 kl. 12:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.00-A00-7-18**

## 8. Kunning frá borgarstjóranum um feriu

### Avgerð

Virkandi borgarstjórin kunnar um teldupost frá Kristin Michelsen, har hann boðar frá, at hann tekur sætið aftur 1. januar 2019.

### Skjøl

- teldupostur frá borgarstjóranum

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 17-2018 |
| Fundardagur | 29. december 2018 kl. 12:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin**

Anita Vibergsdóttir: ____________ A. Vibergsdóttir

Bjarni Hammer: ____________ Bjarni Hammer

Bogi Johannesen: ____________

Alvi Mortensen: ____________

Kristina Roest: ____________ K Roest

Súsanna Bertholdsen: ____________ S. Bertholdsen